# Heimsins mest modernaða smoltalistøð

EcoPiscicultura Rio Blanco í Chili er eitt av heimsins mest nútímans smoltanleggum – og haraftrat telist hetta eisini millum heimsins størstu. Chilenar arbeiða áhaldandi við at minka um deyðiligheitina í yngul-og smoltframleiðsluni. Ætlandi fer norski krúnprinsurin Haakon at vitja Rio Blanco, tá hann fer á almenna vitjan í Chili í januar. Navnið EcoPiscicultura merkir, at hetta er eitt økologiskt smoltanlegg, sum chilenar vilja vera við. Tað er Marine Harvest – ella áður Fjord Seafood - sum eigur Rio Blanco í Chili. Alistøðin liggur 40 kilometrar ella trý korter í bili eystanfyri chilenska laksahøvuðsstaðin, Puerto Montt.



# Flogskiparar væl nøgdir við kjak um flogvøll

**Fakligheitin má vera tað týdningarmiklasta í einum kjaki um nýggjan flogvøll, halda teir flogskiparar og flogstýrimenn, sum luttóku á kjakfundi á Svangskarði um nýggjan flogvøll**



*Smá hálvtannaðhundrað fólk, næstan bara menn, høvdu leitað sær niðan á Svangaskarð at lurta eftir framløgu og kjaki um møguleikar fyri nýggjum, altjóða flogvølli á Skorhædd og Eystnesi. Millum annað tríggir flogskiparar og -stýrimenn*



*Janus Rein, sum er flogstýrimaður hjá Atlantsflog, fegnast saman við starvsfeløgum um, at ljós verður sett á fakliga grundarlagið undir kjakinum um nýggjan flogvøll*

FLOGFERÐSLA
Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

Vit sakna, at kjakið um flogviðurskifti byggir á faktiska veruleikan. Tí var fyrilesturin á Svangaskarði mánakvøldið eitt kærkomið innslag í flogvallakjakið, halda tveir flogstýrimenn, ið vóru komnir at lurta.

- Mær dámdi væl hasa framløguna, har fyrilestrahaldarin setti fokus á kjakið um flogvøll og flogvallaviðurskifti. Tað, sum vit oftani hoyra, er, at nógv fólk hava lyndi til at gera seg til serfrøðingar uttan at vita, hvat fyrigongur. Hetta oyðileggur tað samlaða kjakið, tá man ikki tekur fakligheitina framum. Vit flogskiparar og flogstýrimenn hava saknað, at man byggir pástandirnar á fakta. Alt ov nógv byggir á gitingar, sum til dømis, hvar tað er turbulensur, og hvar tað ikki er turbulensur. Tá spyrja vit okkum sjálvar, hvar vita fólk tað frá? Eru tey von við at hanga uppi í luftini? Tað er ikki á jørðini, vit skulu hava turbulens ella ikki, tað er innflúgvingin frá 10 fjórðingum og niður til endan av vøllinum, vit skulu fyrihalda okkum til turbulens. Teir, sum vita mest um hetta, eru tyrluflogskiparar og ikki landkrabbar. Men flogskiparanir verða ikki spurdir. Vit hava nógvar vindar í Føroyum og djúp lágtrýst, ið hava sína ávirkan, og okkara landslag ger, at tað er nógvur lokalur turbulensur nógvastaðni. Tí mugu nágreiniligar kanningar gerast av hesum. Vit mugu koma til botns, áðrenn nøkur niðurstøða verður gjørd um, hvar nýggjur flogvøllur skal liggja. Tað er hóast alt turbulensur, ið fólk óttast mest, sigur Janus Rein.

Hann heldur, at Søltuvík eigur at verða strika sum evnið at gera nýggjan flogvøll.

- At gera ein 1800 metrar langan flogvøll í Søltuvík vildi verið tápauligt, og tað hoyrdi tú, at allir mínir starvsfelagar tóku undir við. So kunnu vit akkurát tað sama halda fram við at brúka vøllin í Vágum. Vit mugu gera okkum nakrar tankar um, hvat vit vilja, sigur Janus Rein.

Starvsfelagin, Hjalgrim Magnussen, flogstýrimaður, sigur soleiðis um flogvallaspurningin:

- Eg haldi, at fyrilesturin var objektivur, har man hevði fingið skilt tað lokalpolitiska burturúr, sett ljós á, at tað snýr seg um at fáa ein góðan flogvøll til Føroyar, og ikki so og so nógv arbeiðspláss til eitt lokaløki. At man er áhugaður í, hvar tann besti flogvøllurin kann liggja. Tað var hetta, ið var tað mest áhugaverda við fram0løguni, sigur Hjalgrim Magnussen.

# Djurholm svarar aftur upp á atfinningar

**Áðrenn politisk støða og avgerð kann takast um, hvar ein nýggjur flogvøllur skal ella kann gerast, verður fyrst neyðugt at kanna, hvar tað best egnaði lendi er, skrivar Landsverk í viðmerkingum til atfinningarnar móti eini norskari kanning. Viðmerkingarnar koma eftir tilráðing frá landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm**

FLOGFERÐSLA
Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

Tað er Vinnumálaráðið, sum hevur biðið Landsverk gera kanning av flogvallaviðurskiftum. Landsverk bað tí norsku fyritøkuna, Asplan Viak, at standa fyri kanningini av lendi til flogvøll. Eftir tilráðing frá landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm, kemur stovnurin við eini viðmerking til greinina í Sosialinum í gjár, sum bygdi á útsagnir hjá serfrøðingi í flogvallaviðurskiftum, Gilla Trond.

»Í hesum sambandi verður ikki bara hugt eftir, hvar tað ber til at gera eina lendingarbreyt við eini ávísari longd, men hugt verður eisini eftir galdandi altjóða myndugleikakrøvum til lendið í inn- og útflyvingarøkinum og til lendið rundan um og nærhendis vøllin. Sum dømi kann nevnast, at sambært galdandi altjóða myndugleikakrøvum til inn- og útflúgvingarøkið verða settar treytir fyri hvussu høgt lendið má vera í ein frástøðu út til 15 km frá sjálvari lendingarbreytin, og tí verður neyðugt ikki bara at gera lendiskanningar nærhendsis vøllinum, men eisini 15 km út. Um lendi lýkur altjóða krøv er næsta stigið at kanna veðurfrøðiligu viðurskiftini.«

Víðari skrivar stovnurin:

»Kanningarnar sum Landsverk hevur staðið fyri, sum Norska fyritøkan Asplan Viak hevur gjørt, er ein kanning sum einans hevði til endamáls at staðfesta, hvar í Føroyum tað ber til, út frá verandi lendisviðurskiftum, at gera ein nýggjan vøll. Treytirnar, sum Landsverk setti til hesa kanningarnar, vóru, at øll galdandi altjóða myndugleikakrøv til lendi skuldu lúkast.

Harafturat var Asplan Viak biðið um at avmarka kanningarnar til økini, sum eru nærhendis verandi ella framtíðar innfrákervinum. Hetta merkir, at Suðuroyggin og útoyggjarnar ikki eru við í kanningini. Metingarnar og niðurstøðinar hjá Asplan Viak eru grundaðar á data frá GIS skipanina hjá FDS. Frágreiðingin sum Asplan Viak hevur gjørt fyri Landsverk sigur sostatt, hvar egnað lendi er til flogvøll, sum líkur altjóða krøv. Tí skulu fleiri kanningar gerast av veðurfrøðiligum slag, áðrenn staðfestast kann, hvar best egnaða staðið er. Metingar um veðurlíkindi í rapportini eru sostatt avgjørt sekunderar, men av tí at ráðgevararnir hava drúgvar royndir innan økið, eru hesar metingar tiknar við. Í frágreiðingina hjá Asplan Viak verður víst á, at tað ikki uppá nakran máta ber til at lúka altjóða myndugleikakrøvini til lendi í inn- og útflúgvingarøkinum við Skorhæddina sambært ICAO Annex 14. Hetta er millum annað tí, at fjøllini norðanfyri og vestan fyri Skorhæddina, forða í inn- og útflúgvingarplaninum.«

Landsverk ger vart við, at Asplan Viak er viðurkend norsk ráðgevarafyritøka innan flogvallaøkið við drúgvum royndum.

»Eisini hevur viðurkenda danska ráðgevarafyritøkan Rambøll dygdartryggjað rapportina. Umframt sjálvt at eftirkanna rapportina, hevur Landsverk havt ein "second opinion" bólk at meta um ráðgevingararbeiðið. Í hesum bólki hava sitið serfrøðingar frá Avinor (eiga og reka allar norskar flogvallir uttan Gardemoen), Oslo lufthavn (Gardemoen), Luftfartsverket í Svøríki, og partvíst úr Reykjavíkar lufthavn.«